# Misjøvn konsert við Bet you are William

**Petur Háberg og Bet you are William borðreiddu við ymiskum hugløgum av tónleiki tá teir spældu í Reinsaríinum**



TÓNLEIKUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tað var ein sera broytilig konsert við Bet you are William í Reinsarínum. At byrja við stóð Petur Háberg einsamallur á palli við akustiskum og elektriskum gittara.

Hesin byrjandi parturin av konsertini var sera intensur, og við søgunum aftanfyri sangirnar rúnarbant Petur áhoyrarnar. Henda løtan meðan hann spældi einsamallur var sera hugtakandi, og passaði sera væl til spælistaðið.

Løtu seinni skifti hann til elektriskan gittara, og hetta riggaði eisini væl. Hann fekk ein afturat sær við elektriskum gittara, og saman spældu teir væl.

Eftir hetta kom allur bólkurin í Bet you are William á pall, og teir framførdu sera sannførandi. Við frálíkum tónum og góðum lagi fingur teir ta annars lítlu áhoyrarafjøldina at vera við uppá tað.

Saman spældu teir fleiri løg av fløguni, sum vónandi skjótt kemur út. Og hesin triðji og seinaswti parturin av framførsluni var eisini sera góður.

Alt í alt var hetta ein sera góð konsert, ið Bet you are William borðreiddi við, og eftir mínum tykki er tónleikurin á einum støði, ið er ov lítið til bert at fevna um føroyska tónleikapallin. Flestu av hinum áhoyrarunum munnu vera samdir við mær.

Við hesari konsertini prógvaði Petur Háberg, at hann hóskar seg til einhvønn pall og til eitthvørt umhvørvi, stórt ella smátt.



# Brandur vinnur hjørtu enn

**Konsertin við Brandi Enni var sera hugnalig, og uttan iva nýttu mong høvi at enduruppliva ein av kærastu songfuglum okkara**

TÓNLEIKUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Endiliga er lív komið í hann aftur. Nú eru eftirhondini nógv ár síðani at vit hoyrdu nakað serligt til sangfuglin Brandur Enni. Nú er hann vorðin nøkur ár eldri og røddin er vorðin búnari, men enn klárar hann at sjarmera seg inn í hjørtuni á gentunum. Við klárari rødd og reinum sangi undirhelt hann stóru fjøldini í Tjóðpalli Føroya.

Fjøldin var fyri tað mesta konufólk, og hugsast kann at fleiri av teimum, ið fyri nøkrum árum síðani vóru púra vekk í honum, leitaðu sær niðan í Tjóðpallin at enduruppliva hann. Og eingin av teimum mundi verða skuffað av framførsluni. Ein sera hugnaligur stemningur var inni, og fólk høvdu hug at syngja við. Uppaftur betri gjørdist stemningurin, tá hann endaði við einum sangi, ið vit øll kenna, og sum byrjar við "eg í eygum tínum sá". Tá fór ein rembing gjøgnum salin, og øll fingu hug at syngja ella murra við lagnum.

Alt í alt ein sera hugnalig konsert, har áhoyrararnir fyri tað mesta vóru ungar gentur og gentur, ið vildu enduruppliva songfuglin.

# Sjarmerandi Martin Joensen



**Inni í Tjóðpallinum var deiligur stemningur, meðan Martin Joensen og hansara menn framførdu**

DANSUR
*Sunneva Háberg Eysturstein*
*sunneva@sosialurin.fo*

Við á pallin hevði hann Paula Magnussen og Eyðun M. Hansen umframt sonin Sakaris Emil Joensen, sum eg fyri fyrstu ferð havi sæð vekk frá bassinum og á gittara ístaðin. Stuttligt at síggja pápa og son framføra saman, tá teir báðir eru so góðir tónleikarar og harafturat líkjast nógv, uttan at tað gerst pínligt.

Bæði samanspæl og ljóð var gott, Martin var sjarmerandi sum altíð, og eg kann ikki siga annað enn, at tað var ein góð og hugnalig løta. Serliga var tað endin við varðanum Svarti Ravnur, sum fekk nostalgiið at røra seg innaní. Og at síggja tannáringar syngja við av øllum hjarta ger bara alt tað heila eitt stórt vet meira rørandi.



# Hóps settu hol á

**Tá Futt í Býin fór í gongd, var tað ikki eiti á byrjan tað fekk**

DANSUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Hóps framførdi við modernaðum hip-hop dansi á lítla pallinum, og tað sluppu tær sera væl frá. Koreografiin var uttan iva uppá pláss, og taktin varð hildin gjøgnum alla framførsluna.

Tað, sum rystast kundi, varð ryst, og tað, sum sleingjast kundi, varð slongt.

Ein frálík dansiframførsla. Tó er at siga, at prikkurin yvir i'num manglaði. Sjálva framførslan var fín, og genturnar vóru eggjandi og væl smurdar. Men einki veruligt tema sást á búnunum hjá teimum, burtursæð frá at næstan allar høvdu leysar, gráar buksur.

Men tó var hetta ein dansiframførsla, og dansurin varð undir øllum umstøðum sera væl úr hondum greiddur.